*Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu*

# Skeyt bil í túninum

Ein fullur maður í Miðvági var illur, tí onkur hevði parkerað ein bil í túninum hjá honum. Hann ringdi til løgregluna, men tá politistarnir onki gjørdu, tók hann byrsuna og skeyt eitt hjól á bilinum

Tú skalt ansað tær, um tú ætlar at parkera bilin í túninum hjá onkrum. Áðrenn tú veitst av, kann vera, at onkur hevur skotið bilin hjá tær sundur og saman. Tað var júst hetta, ið sambært politinum hendi leygardagin.

- Ein maður ringdi til okkum seinnapartin, og greiddi frá, at onkur hevði sett bilin í túninum hjá honum, og at bilurin stóð til ampa. Maðurin var ávirkaður, og skuldi nokk ongan veg í bilinum, og tá politistar komu á staðið var maðurin ikki at tosa við. Tað næsta vit vistu, var at maðurin hevði skotið eitt hjól á bilinum við byrsu, greiðir vakthavandi frá.

Og soleiðis tryggjaði maðurin sær, at bilurin á ongan hátt slapp úr túninum.

- Eg rokni heldur ikki við, at tað er serliga hugaligt at skifta dekk, tá bilurin er skotin, sigur vakthavandi.



*Tað loysir seg ikki altíð at parkera í túninum hjá øðrum. Hetta upplivdi ein persónur í Miðvági leygardagin*

*- Næstan øll koyra ov skjótt á landsvegunum, sigur vakthavandi*



## Átta koyrdu ov skjótt

Løgreglan í Eysturoy gjørdi ferðslukanningar um vikuskiftið, og ikki færri enn átta fólk vóru tikin fyri at koyra ov skjótt.

- Tað vísir seg, at næstan øll, sum koyra á landsvegunum, koyra ov skjótt, sigur vakthavandi. Hann greiðir somuleiðis frá, at fólk onki leggja í, um tey fáa eina lítla bót á nakrar fáar 100 krónur, men at klippini gera eitt sindur av muni, umframt, at broytingarnar, ið eru ávegis í ferðslulógini kunnu gera mun.

Av teimum átta, ið vóru tikin um vikuskiftið, fingu 7 klipp og ein fekk treytaða frádøming av koyrikortinum.




*Politistar máttu renna úr miðbýnum í Grasagarð eftir einum manni, ið helt, at løgreglan skuldi síggja afturpartin hjá honum*

## Gjørdi óhapp uttan kort og plátur

Nøkur ferðsluóhapp vóru um vikuskiftið, og ein maður var við í trimum av teimum.

- Tað er ein maður, sum av heilsuligum ávum hevur mist koyrikortið, sigur vakthavandi.

Leygardagin fór hann biltúr og megnaði at vera við í trimum ferðsluóhappum. Bilurin hevði ongar plátur og maðurin onki koyrikort.

- Maðurin rendi á fleiri garðar, og tað er púra greitt, at hann ikki er førir fyri at hava koyrikort, sigur vakthavandi.

Nøkur onnur óhapp vóru eisini, men onki var álvarsamt.

## 13 herverk um vikuskiftið

Heili 13 herverk vóru um vikuskiftið. Tey flestu vóru í Havn, men eisini aðrastaðni í landinum vóru herverk. Tað ógvusligasta var bilurin, ið varð skotin, men 12 onnur vóru eisini. Líka frá skøvaðum bilum, til knústar rútar.

- Tað er so øgiliga dýrt, tá bilar verða brotnir, tað loypir beinanvegin upp á fleiri 1000 krónur, og tað vísir seg, at tað upp á seg er øgiliga nógv herverk í Føroyum, sigur vakthavandi.

Stóri trupulleikin við herverkinum er, at tað er ofta, at sera fáir møguleikar eru at finna gerningsfólkini.

## Aftur afturpart til løgregluna

Aftur hetta vikuskiftið helt onkur, at løgreglan hevði uppiborið at síggja eina rumpu, tí tað var júst hetta, sum hendi niðri í miðbýnum. Tá løgreglan skuldi hava fatur á ávirkaða manninum byrjaði hann at renna. Í Grasagarði varð maðurin handtikin, og kann rokna við eini bót á einar 800 krónur.

Hetta er nakað, sum javnan kemur fyri, og vísir seg at henda, tá fólk hava fingið eitt sindur ov nógv niðurum.

**Grunnurin til frama fyri samstarvi og fatan millum Nuuk – Reykjavík – Tórshavn**

Møguleiki er at søkja stuðul úr felagsgrunninum Nuuk – Reykjavík – Tórshavn. Ætlanin er í juni mánaði at taka avgerð um veitan av stuðli.

Býarstýrini Nuuk, Reykjavík og Tórshavn hava sett pening í grunnin, hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

Tórshavnar býráð heitir tí á einstaklingar, feløg o.o., ið halda seg koma undir treytirnar fyri stuðli, um at senda býráðnum umsóknarblað við frágreiðing um tiltakið, nær tað verður og um mettan kostnað. Hetta umsóknarblað fæst í Snarskivuni ella inni á heimasíðuni hjá kommununi.

Meiri fæst at vita um treytir við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra, telefon 302010.

Umsókn merkt »Nuuk – Reykjavík – Tórshavn« eigur at vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 28. mai 2009.

Tórshavnar kommuna